# ítróttur

Nr. 216 • hósdagur • 10. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Viborg fylgir við Símuni

**Eftir royndarvenjing í eina viku, fer Símun Samuelsen nú aftur til Íslands, har fyrireikingarnar til komandi kappingarár standa á skránni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í seinastu viku var vágbingurin og landsliðsspælarin, Símun Samuelsen, til royndarvenjingar hjá danska superligufelagnum, Viborg.

Venjarin hjá Viborg, Ove Christiansen, hevði sjálvur ynskt at hyggja nærri at evnaríka spælaranum, og tó at eingin handil spurdist burtur úr í hesum umfarinum, so eru dyrnar als ikki læstar.

- Teir í Viborg vildu fyrst og fremst síggja Símun sjálvir, sigur Jákup í Stórustovu, leikaraumboðsmaður.

Hann leggur dent á, at tað sum so ikki var ætlanin, at spælarain skuldi seljast her og nú. Men at teir í Viborg sjálvir vildu síggja spælaran undir venjing, soleiðis at teir kundu gera av, hvørt teir skuldu fylgja honum enn nærri.

Símun Samuelsen fer nú aftur til Íslands, har hann eisini komandi kappingarárið er sáttmálabundin at Keflavík. Teir gjørdust í ár nummar fýra í íslendsku kappingini, og nú eru teir so farnir í holt við fyrireikingarnar til enn komandi kappingarár.



*Viborg tykist á ongan hátt hava mist áhugan fyri Símuni Samuelsen, sum í seinastu viku royndarvandi í danska SAS-ligu felagnum*

## Todi umhugsar at gevast

Seinasta hálva árið hevur Todi Jónsson spælt fótbólt í Kristiansand í Noreg. Tá avtalan við Start varð gjørd, samdust partarnir í fyrstu atløgu um ein hálvt ára sáttmála, og um hetta gekst nøktandi, so kundi hesin leingjast.

Ítróttarliga munnu tey flestu hava verið so hampuliga væl nøgd. Hóast tað í seinasta dystinum akkurát glapp hjá Start í norska gulldystinum, og hóast Todi í hesum avgerandi dystinum tvær ferðir rakti træverkið, so er føroyski spælarin fallin inn í spælið hjá Start.

Men uttan fyri vøllin hevur tað ikki gingið eins væl hjá Toda. Áður hevur hann sagt, at tað var ógvuliga tungt at venja og spæla dyst í Noreg, meðan restin av familjuni var í Keypmannahavn.

Og nú er nógv, sum bendir á, at hetta eisini er atvoldin til, at sáttmálin við Start ikki verður longdur.

Við donsku heimasíðuna, bold.dk, sigur Todi, at samráðingarnar við Start ikki ganga heilt so væl, sum hann kundi ynskt sær, og at hann tí kanska gevst við fótbólt á hægsta støði. Enn vil hann tó ikki avvísa, at talan kanska verður um fótbólt í næst bestu donsku røðini.

**-mørk**

Neistin-H71 24-38 (11-19):

## H71 skal takast í álvara

**Eftir fleiri ár, har hoyvíkingarnir hava hótt við at flyta upp á stigatalvuni, tykist liðið í ár veruliga at hava møguleikan til hetta**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Hetta varð enn einaferð undirstrikað, tá H71 vitjaði hjá Neistanum mikukvøldið. Fyrr í heyst hava hoyvíkingarnir vunnið tryggan sigur á Neistanum, og heldur ikki hesaferð var nakar serligur ivi um útfallið.

At kalla allan dystin øktu hoyvíkingarnir stútt og støðugt um leiðsluna, soleiðis at Neistin í roynd og veru ongan tíð var serliga nær við at skapa spenning av nøkrum slag. Einasti Neista-maðurin, sum tað veruliga glógvaði í, var Blagoje Buha, men einsamallur kundi hann ikki gera tað heilt stóra kortini.

Við sigrinum mundu hoyvíkingarnir enn einaferð staðfesta, at teir skulu takast í fullum álvara í ár. At liðið ikki longur bara er eitt upplop, sum við hvørt hevur hug at hótta tey stóru, men sum kortini fellur niður aftur, sum kappingin líður.

Sjálvandi kunnu teir enn tað, nú kappingin er komin somikið stutt, men avrikini hava í nógvum førum verið somikið sannførandi í ár, at talan í veruleikanum hevur verið um klassamun.

Higartil eru teir eisini einasta liðið, sum hevur tikið stig frá grøna oddaliðnum, og spurningurin tykist í løtuni vera, hvørt H71 ikki er fremsti avbjóðarin til oddasessin. Á stigatalvuni eru teir tað í øllum førum. Um teir eisini eru tað í veruleikanum, fæst helst at vita leygardagin, tá júst Kyndil og H71 bresta saman í høllini á Hálsi í Havn.

VÍF-Stjørnan 22-33 (11-15):

# Stjørnan bara økir

**Tað tykist ikki vera nakar ivi um, hvat sterkasta liðið í kvinnudeildini er í ár**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Higartil hava hondbóltskvinnurnar úr Klaksvík spælt sjey dystir. Úrtøkan hevur verið maksimal, og hartil hevur talan eisini verið um ein málmun, ið má tykjast mest sum ræðandi hjá mótstøðuliðunum. Eitt pluss upp á 88 á málkontini - 17,6 í miðal - boðað í øllum førum frá sannførandi sigrum, og mikukvøldið kom ein afturat av slagnum.

Hesa ferð vitjaði Stjørnan hjá VÍF, sum annars tykist hava fótað sær hampuliga væl, men tað var tó á ongan hátt nóg mikið móti Stjørnuni.

Frá fyrsta bríksli drønaði Stjørnan avstað, og alt fyri eitt løgdu tær sjógv millum liðini. Eftir eitt time-out kom VÍF tó nakað aftur, men tað var fyri eina løtu. Stjørnan setti aftur ferð á, og so var eingin ivi.

Ikki minst hevur Stjørnan í ár havt eitt stórt fysiskt yvirskot, og hetta varð aftur staðfest í seinna hálvleiki. VÍF megnaði snøgt sagt ikki at fylgja við gestunum, sum bara tóktust at økja. Og við 11 málum á muni var sum heldur ikki tað stóra at tosa um, tá dysturin var liðugur.

**Sunset-kappingin**

| | | d | v | - | j | - | t | mál | mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 7 | 7 | - | 0 | - | 0 | 212 | 124 | 88 | 14 |
| 2 | Neistin | 8 | 6 | - | 0 | - | 2 | 215 | 158 | 57 | 12 |
| 3 | Kyndil | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 156 | 155 | 1 | 10 |
| 4 | VÍF | 9 | 4 | - | 0 | - | 5 | 221 | 215 | 6 | 8 |
| 5 | VB | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 96 | 76 | 20 | 6 |
| 6 | StÍF | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 155 | 181 | -26 | 4 |
| 7 | Søljan | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | 125 | 185 | -60 | 2 |
| 8 | Tjaldur | 7 | 0 | - | 0 | - | 7 | 114 | 200 | -86 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | d | v | - | j | - | t | mál | mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 6 | 5 | - | 1 | - | 0 | 174 | 144 | 30 | 11 |
| 2 | H71 | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 190 | 146 | 44 | 9 |
| 3 | VÍF | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 174 | 175 | -1 | 6 |
| 4 | StÍF | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 148 | 160 | -12 | 6 |
| 5 | Neistin | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 158 | 188 | -30 | 2 |
| 6 | KÍF | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 142 | 173 | -31 | 2 |

## FAKTA UM DYSTIN

**VÍF-Stjørnan 22-33 (11-15)**
Málskjúttar
**VÍF:** Ioana Rápa 5(1), Sóley Mikkelsen 4, Fríða Marjunardóttir 4, Linda Johannesen 4, Finngerð Jensen 3, Jacklin Durhuus 1, Tórgunn H. Johansen 1
**Stjørnan:** Alina Olaru 7(3), Katarina Stepanov 6(1), Anna Kristina Samson 6, Louisa Andreasen 5, Bára Skaale Klakstein 5, Una Olsen 3, Birita Joensen 1
**Brotskøst:** VÍF 1, Stjørnan 4
**Útvísingar:** VÍF 2, Stjørnan 1
**Dómarar:** Heri Petersen & Hallur Danielsen

## FAKTA UM DYSTIN

**Neistin-H71 24-38 (11-19)**
Málskjúttar
**Neistin:** Blagoje Buha 14(3), Áki Mørk 4, Tróndur Kragesteen 2, Dann Thorleifsson 2, Bogi Berg 1, Karl Odmar Rasmussen 1
**H71:** Niels Viggo Niclasen 9, Tróndur Vatnhamar 8(1), Heini Bendtsen 6, Jakob Jónson 4, Halgir Dahl Olesen 4(1), Johnny Durhuus 4, Sigtór Andreasen 2, Olaf Vesturgarð 1
**Brotskøst:** Neistin 3, H71 3
**Útvísingar:** Neistin 3, H71 3
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen.